# Er eingin breidd ver›ur heldur eingin elita

*Ikki ver›ur bert kappast í ítrótti her á landi, men eisini innan tónleik. Um vikuskifti› var forvitnislig konsert í Nor›urlandahúsinum. 17 evnarík ungfólk hava kappast og seks teirra sluppu at royna seg sum solistar saman vi› Føroya Symfoniorkestri*

Myndir: Jonhard Hammer

> *- Útvarpi› spælir popp frá morgni til myrkurs undir ymsum heitum. Føroyingurin skal upp at darta frá tí hann vaknar.*

Dagfinn Olsen

Seks evnarík ungfólk royndu seg sunnudagin sum solistar saman vi› Føroya Symfoniorkestri. Tey vóru 17, i› kappa›ust um hesi plássini.

Tey seks ungu eru millum 14 og 17 ár. Tey eru Johan Hentze, trompet, Gu›n‡ Næs, violin,, Jón Festirstein, violin, Marjun Heerup Olsen, tvørfloyta, Kristina Dalsgar›, klaver og Andrea á Dul Mortensen, klaver.

Saman vi› Symfoniorkestrinum og dirigentinum og musikkskúlastjóranum Martin Mouritsen, høvdu tey eina gó›a framførslu.

Gott tiltak

Ein teirra, i› fegna›ist um konsertina, var fyrrverandi musikkskúlastjórin Ólavur Hátún.

- Eitt spennandi og gott tiltak og ta› er gott, at fremstu næmingarnir sleppa at royna seg. Eisini er gle›iligt, at undirtøkan var gó›, tí standardurin var gó›ur hjá solistunum og tey vóru væl fyrireika›i. Stø›i› er høgt í toppinum, sta›festir Ólavur Hátún.

Hann minnir á, at tónleikarar, i› koma uttanífrá, ofta hava havt á munni, hvussu gott potentiali er í fólkinum.

## Elituna í huga

- Vit hava gó›ar lærarar og musikkskúlalógin krevur eisini, at lærararnir hava gó›a útbúgving. Vit eiga at hava elituna í huga og í so máta var tiltaki› gott, sigur Ólavur Hátún.

Royndir eru hvørt ár og próvdómarar koma úr Onglandi. Næmingurin kappast ímóti sær sjálvum á ymsum stigum.

- Á henda hátt fær næmingurin avbjó›ingar, sigur Ólavur, i› vónar, at yngru kreftirnar fara at útbúgva seg innan tónleik og fara á konservatorii›. Ta› heldur hann má vera endamáli›, so vit fáa samanhang í.

## Gongur aftur á hond

Ólavur Hátún var fyrsti stjórin á Musikkskúlanum. Tá hann kom til í 1985, vóru 24,5 lærarastørv. Áhugin var stórur og skúlin kom uppá 44 størv.

Sí›ani komu ringu tí›irnar og Ólavur dylir ikki, at eisini tvørrandi politiskur vilji var vi› til at føra skúlan aftureftir. Í dag eru 25 lærarastørv í Musikkskúlanum.

- Hetta merkir í roynd og veru, at skúlin er aftur har hann byrja›i.

Skúlin anir enn, men ikki hongur saman. Serliga ikki í útja›aranum Tónleikalærarar fer›ast t.d. um Su›uroyarfjør› og vestur í Vágarnar. Men ta› blívur ongantí› til naka› veruligt á sta›num, harmast Ólav ur, sum minnist tí›ina, tá besta unglingaorkstri› í landinum var í Vágunum.

- Musikkskúlin hevur veri› í kreppu í 10 ár, heldur Ólavur Hátún.

- Á einum fundi ásanna›u vit, at fór læraratali› ni›urum 35, so sansa›i at í útja›aranum, men sta›festast má, at politiskt bleiv gólvi› tiki› undan skúlanum aftur, sigur Ólavur.

## Breidd

- Sum eisini ver›ur sta›fest í mentanarálitinum frá 1973, so má peningur til. Útrokningar siga, at vit lata minst pr. persón til mentan, um vit sammeta okkum vi› grannar okkara, sigur Ólavur.

- Er eingin breidd, ver›ur heldur eingin elita. Í Noreg er máli›, at 30% ganga til spæl. Hjá okkum er neyvan talan um meira enn 5%, metir Ólavur Hátún.

- Samanbera vit Klaksvík og Akranes í Íslandi, sum hava sama fólkatal, so eru umlei› 250 musikkskúlatímar har. Í Klaksvík vóru 64 tímar, tá eg var í skúlanum, minnist Ólavur.

## Hoyra av líti› av klassiskum

Í Føroyum eru ikki gó›ir møguleikar at hoyra klassiskan tónleik. Tí fegnast Ólavur Hátún um eitt tiltak, sum konsertina sunnudagin.

- Útvarpi› spælir popp frá morgni til myrkurs undir ymsum heitum. Føroyingurin skal upp at darta frá tí hann vaknar. Sjálvsagt skulu vit eisini hava popp, sigur Ólavur, sum sjálvur dagliga arbei›ir vi› lurtitólinum vi› li› og honum dámar lívligan tónleik.

Men hann metir, at eitt slag av slúsu má vera, so alt ikki bert ver›ur koyrt út. At klassiskur tónleikur eisini má út millum fólk, er hann ikki í iva um, eisini tá havt ver›ur í huga, at Sjónvarpi› ikki sendir hetta.

- Fyrr sendi Svf opera og anna› tílíkt, men ta› er sjáldan longur.

- Av tí, at so líti› er at hoyra, er umrá›andi at hava livandi tónleikalív, sigur Ólavur og leggur afturat, at tónleikalærarar eisini áttu at havt møguleika at virka sum tónleikarar, tí a›rasta›ni hava tey slík ensemble, har lærarar leika, heldur Ólavur Hátún.

- Vit kundu t.d. sagt, at lærarar í 2 tímar av tí›ini spældu og vandu, sigur Ólavur Hátún.

## N‡ggjársf‡s

- Nú halda fólk, at ta› er fantastiskt vi› t.d. n‡ggjárskonsertini, men vit innflyta nógv fólk at leika og nógvur peningur fer til hetta. Kanska er hetta bert n‡ggjársf‡s, i› kundi fari› betri, heldur Ólavur.

Hann leggur dent á, at hann metir tiltaki› vera gott og ta› skal vera, men halda fólk hetta vera stø›u okkara, so er ta› misvísandi.

- Vit eiga at mi›a eftir at hava stø›ugt arbei›i alt ári›, tí tá hava eisini tey ungu ein møguleika at vera vi› og menna seg, heldur Ólavur.

- Sunnudagin spældi Symfoniorkestri› verk eftir Mozart. Hetta var kanska heldur vatndeyvt, men ta› er sjálvsagt, tí tónleikararnir hava ikki møguleika at halda seg í venjing, sigur Ólavur, i› leggur dent á, at hetta er ikki fyri at ni›urgera tónleikarnar.

Ólavur vónar, at ungu tónleikararnir fara at fáa sær tónleikin sum vinnuveg, men samstundis sta›festir hann, at so mugu tey eisini hava okkurt at koma aftur til.

Hann metir eisini, at tó at vit hava stjørnurnar, so mugu vit ikki gloyma breiddina.

Ólavur er sannførdur um, at ta› má ein hugbur›sbroyting til hjá politikarum, skal vend koma í.

## Størsta gávan

Ólavur, sum eisini er kendur sum forsprákari innan ítrótt, heldur ikki, at rætt er at skilja ímillum t.d. ítrótt og tónleik.

- Í mínum hugheimi hoyrir alt ungdómsarbei›i saman. Ikki er rætt at skilja sundur, sigur Ólavur og vísir á, at í Svøríki sigur ein kanning, at millum ungfólk liggur tónleikurin sum fremsta áhugamál og ítrótturin sum nummar tvey.

Ólavur minnir á, at William Heinesen seg›i hugvekjandi or› vi›víkjandi tónleikinum. - Hann seg›i, at tónleikurin er størtsa gávan til mannaættina, sigur Ólavur Hátún, sum hóast hann hevur lagt frá sær í musikkskúlastjórastarvinum vegna aldur, enn er virkin undirvísari og ikki minst innan livandi tónleikalívi›.